gult14 cyan14 magenta14 svart14



FISKIVINNUTÍÐINDI

## Gólvuppboðssølan

Gólvsølan

67 bátar seldu 35 tons um gólvsøluna hjá Fiskamarknaðinum týsdagin. Niðanfyri framgongur, hvussu nógv einstøku bátarnir seldu. Gevið gætur, at sølan um telefonuppboðssøluna ikki er íroknað

| Syslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| FD 176 | Helen | lína | 1.340 |
| FD 205 | Greta | lína | 3.427 |
| FD 250 | Halgerð | lína | 590 |
| FD 256 | Aðnasker | snella | 65 |
| FD 258 | Tinna | lína | 349 |
| FD 316 | Annfríð | lína | 319 |
| FD 33 | Krabbin | lína | 130 |
| FD 380 | Amanda | snella | 188 |
| FD 386 | Slættiklettur | lína | 469 |
| FD 424 | Morning star | snella | 25 |
| FD 492 | Klettur | lína | 38 |
| FD 580 | Thomas Nygaard | lína | 960 |
| FD 67 | Huldusteinur | lína | 829 |
| FD 780 | Bakkafossur | snella | 302 |
| FD 783 | Glúpur | lína | 2.539 |
| FD 855 | Lómur m/b | lína | 302 |
| FD 860 | Sjóguttin | lína | 1.141 |
| FD1148 | Hellisberg | lína | 258 |
| KG 125 | Bjarnaberg | lína | 629 |
| KG 127 | Skurðaklettur | lína | 2.862 |
| KG 334 | Norðan | lína | 982 |
| KG 423 | Jaspissteinur | lína | 626 |
| KG 561 | Fagriklettur | lína | 848 |
| KG 63 | Pollur | lína | 741 |
| KG 703 | Henny | lína | 453 |
| KG 706 | Skýlisklettur | lína | 512 |
| KG 744 | Osla | lína | 2.299 |
| KG 812 | Sylvia | lína | 688 |
| TG 10 | Evi | snella | 54 |
| TG 147 | Havrenningur | snella | 89 |
| TG 159 | Vesturbúgvin | snella | 149 |
| TG 283 | Herdis | snella | 401 |
| TG 303 | Rich. í Smiðjuni | snella | 102 |
| TG 310 | Sjóriddarin | snella | 114 |
| TG 397 | Kvikk | snella | 286 |
| TG 40 | Kambur | snella | 47 |
| TG 435 | Jórun | snella | 102 |
| TG 514 | Keldafossur | snella | 250 |
| TG 523 | Sóley | snella | 604 |
| TG 562 | Todnes | snella | 132 |
| TG 592 | Jenny b | snella | 28 |
| TG 609 | Ráaklettur | snella | 149 |
| TG 622 | Varðin | snella | 143 |
| TG 631 | Skarstein | snella | 503 |
| TG 95 | Fløtunes | snella | 286 |
| TN 63 | Liljan | snella | 95 |
| TN 157 | Solo | snella | 122 |
| TN 390 | Trý systkin | lína | 726 |
| TN 753 | Tóra | lína | 1.345 |
| TN 892 | Nøvan | snella | 113 |
| TN 897 | Maj-n | snella | 55 |
| TN1090 | Annika | lína | 934 |
| VA 109 | Ella | lína | 451 |
| VA 132 | Lív | snella | 51 |
| VA 221 | Carina | lína | 407 |
| VA 242 | Suðurfarið | snella | 40 |
| VA 275 | Áardánjal | snella | 32 |
| VA 294 | Nestangi | lína | 491 |
| VA 34 | Dunga Hans m/b | lína | 1.090 |
| VA 366 | West Freezer | lína | 111 |
| VA 60 | Dáva Dánjal | lína | 251 |
| VA 82 | Raðnes | snella | 753 |
| VN 156 | Hanus á Bø | snella | 65 |
| VN 20 | Emanuel | snella | 102 |
| VN 267 | Jenny m/b | snella | 109 |
| VN 286 | Skálabáturin | snella | 182 |
| VN 513 | Klettur | snella | 139 |

| Vørunavn | kilo | | |
|---|---|---|---|
| Brosma 0 | 72 | Longa 4&5 | 3 |
| Brosma 3&4 | 48 | Reyðsprøka 0 | 15 |
| Hýsa 0 | 6 | Skøta | 14 |
| Hýsa 1 | 3.646 | Skrubba | 34 |
| Hýsa 2 | 3.857 | Steinbítur | 9 |
| Hýsa 3 | 3.569 | Toskur 1 | 119 |
| Hýsa 4 | 1.171 | Toskur 2 | 1.027 |
| Havtaska 0 | 113 | Toskur 3 | 2.683 |
| Hvítingur 0 | 13.848 | Toskur 4 | 2.256 |
| Kalvi 2 | 64 | Toskur 5 | 837 |
| Kalvi 3 | 14 | Upsi 0 | 543 |
| Kalvi 4 | 104 | Upsi 1 | 62 |
| Kongafiskur 0 | 1 | Upsi 2 | 14 |
| Liri | 146 | Upsi 2&3 | 596 |
| Longa 0 | 28 | Upsi 3 | 2 |
| Longa 2 | 62 | Upsi 4 | 51 |

# 1.300 føroyingar eiga Harry Potter – og nú kemur aftur ein

**Bøkurnar um Harry Potter hava sligið øll sølumet, bæði fyri bøkur til vaksin og børn**

BÓKAÚTGÁVA
*Tíðindaskriv*




*Tann fyrsta bókin um Harry Potter er týdd til 42 ymisk tungumál, frá albanskum til zulu – og í Kina er staðfest, at fleiri eintøk eru seld av Harry Potter bókum enn »Lítlu reyðu« hjá sjálvum Mao, formanni! Eisini í Føroyum hevur móttøkan verið góð: Harry Potter og vitramannasteinurin er seld í knøppum 1300 eintøkum, og hetta er nógv heima hjá okkum*

Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út næstu bókina um Harry Potter. Hendan eitur Harry Potter og kamarið við loynidóminum – og hon kom í bókabúðirnar í síðstu viku

Bøkurnar um Harry Potter hava sligið øll sølumet, bæði fyri bøkur til vaksin og børn: Síðan tann fyrsta, Harry Potter og vitramannasteinurin, kom út í 1997, eru seldar fleiri enn 100 milliónir eintøk um allan heimin. Tann fyrsta bókin er týdd til 42 ymisk tungumál, frá albanskum til zulu, og bøkurnar hava at kalla uttan støðg ligið ovast á sølulistunum í Evropa, Norður- og Suðuramerika – og í Kina, har tað er staðfest, at fleiri eintøk eru seld av Harry Potter bókum enn »Lítlu reyðu« hjá sjálvum Mao, formanni! Eisini í Føroyum hevur móttøkan verið góð: Harry Potter og vitramannasteinurin er seld í knøppum 1300 eintøkum, og hetta er nógv heima hjá okkum.

Bøkurnar hava vunnið ein hóp av virðislønum, og beint nú leggja tey hjá Warner Bros. síðstu hond á fyrsta biograffilmin, sum væntandi verður frumsýndur til jóla í ár.

Higartil hevur J. K. Rowling skrivað fýra bøkur av ætlandi sjey, eina fyri hvørt árið, Harry er í Hogwarts. Tann triðja á føroyskum kemur fyri jól í ár. Harry Potter og kamarið við loynidómum byrjar eins og fyrsta heima hjá fosturforeldrum Harrys. Hann er í summarfrítíð og upplivir har m.a. ringasta føðingardagin nakrantíð. Og tað sigur ikki so lítið, tí Harry hevur aldrin havt tað gott hjá Dursley fólkunum. Har hendir ymiskt løgið – og stuttligt. Onkur er, sum roynir at forða Harry at fara aftur í Hogwarts. Tað er tað allarringasta, ið kann henda, tí ikki fyrr enn Harry frætti frá gandaskúlanum og fekk at vita um sín egna uppruna, hevur hann varnast, at hann er nakað – og at tað eru fólk, ið halda nógv um hann og eru góð við hann. Men samstundis ásannaði hann eisini, at hann eigur ræðandi óvinir, ið liggja honum eftir lívinum.

Afturkomin í Hogwarts á sera minnisverdan hátt verða Harry, Ron og Hermione skjótt blandað upp í sera spennandi hendingar, tí tað gongur sum rótasúpan, at kamarið við loynidómum er latið upp, og óndar maktir leggja eftir nætningum av muglaraætt…

Harry Potter og kamarið við loynidómum er – um gjørligt – enn meira spennandi enn fyrsta bókin. Vit hitta nýggjar persónar, og støðugt tekur søgan óvæntaða vend, tá ið tú fært meir at vita um teir, ið vit hitta aftur…

Gunnar Hoydal hevur týtt bókina úr enskum. Hon 286 blaðsíður, innbundin í stíva permu og kostar kr. 198 í bókabúðunum. Spf Hestprent hevur umbrotið og prentað bókina.

gult15 cyan15 magenta15 svart15

Bilar
Nr. 121 • hósdagur • 28. juni 2001 • 75. árg.




*Ingi Gunnarsson fekk stóran skaða í apríl 1977, tá hann í hesum Toyota Carina bilinum koyrdi útav á Oyggjarvegnum, stutt omanfyri Havnina*

# Minningardagur teirra deyðu í ferðsluni

**Eins og í fjør verður minningardagur teirra deyðu í ferðsluni hildin fyrsta sunnudag í juli. Í ár verður tað 1.juli.**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Um somu tíð sum nýggja ferðslulógin kom í gildi, tann 1.juli í fjør, var eisini fyrstu ferð at minningardagur teirra deyðu í ferðsluni varð hildin. Dagurin verður hildin, við at blómur verða lagdar út á støð, har ferðsluvanlukkur, sum hava kravt mannlív, hava verið. Samskiparin av tiltakinum, Ingi Gunnarsson í Havn, ið fær hollan stuðul frá RFF, arbeiðir við at finna fram til øll støðini har vanlukkurnar hava verið. Hann hevur sent út soljóðandi tíðindaskriv:

### Tíðindaskrivið

Fyrsti sunnudagur í juli 2000 varð hildin sum »minningardagur teirra deyðu í ferðsluni«, ætlanin er at endurtaka tiltakið aftur í ár. Fyrsti Sunnudagur í ár er 1. Juli.

Í fjør vórðu løgd blómutyssi við vanlukkustøð í Eysturoy og Streymoy, tó var tiltakið avmarkað til tíðarskeiðið 1980 til 2000, av tí at peningur ikki var til meira.

Í ár er so ætlanin at røkka alt landið, tó eru vit ikki kunnug við øll vanlukkustøðini. Til tess at røkka málinum, verður tørvur á meiri peningi og hjálp, til at leggja út blómutyssi. Vit vilja við hesum tiltaki vísa á, at ferðslan krevur alt ov mong mannalív, og royna at ávirka bilførarar ferðsluni til bata, og á ein stillføran hátt minnast tey sum farin eru.

Tiltakið fekk góða undirtøku í fjør og varð heitt á okkum um at halda fram.

Møguleiki er at stuðla tiltakinum við peningagávu á konto 9181-1313500 í Føroya Sparikassa. Ella við at leggja blómur har tey hava mist ein av sínum. Tað er eisini tørvur á hjálp til at leggja blómurnar út, og til seinast so vantar okkum staðkent fólk til at vísa okkum á hvar vanlukkarnar eru hendar, hetta er tó mest galdandi fyri vanlukkur ið eru hendar fyri mongum árum síðani.

### Tøgn á Tórsvølli

Ein av orsøkunum, til at Ingi Gunnarsson ger hetta arbeiðið, er, at hann í apríl 1977 kom út fyri einari álvarsligari ferðsluvanlukku. Hann var einsamallur í bilinum, sum við nógvari ferð fór niðan av Oyggjarvegnum, stutt omanfyri Havnina. Bilurin fór í knús, og Ingi fekk stóran skaða, men hann kom tíbetur frá vanlukkuni við lívinum. Til alla lukku brúkti hann trygdarbeltið.

Í fjør var fyrsti sunnudagurin í juli tann 4. juli. Umframt at blómur vórðu lagdar út á vanlukkustøðini, var eisini hildin tøgn í 1 minutt áðrenn steypafinaluna millum HB og GÍ á Tórsvølli. Tað má vera heilt greitt, at endamálið við hesum tiltaki er at fáa okkum øll at ansa okkum betur í ferðsluni.



*Sum tað sæst á hesi myndini er bilurin sera illa farin. Til alla lukku brúkti Ingi trygdarbeltið*



*Harði stoyturin varð inn á vinstru síðu, har bilførarin sat.*

